## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og yvirhøvur turt, men támut veður. Um kvøldið regn. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og stundum regn ella mjørki. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri og útsynningi og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin upp í hvassan vind av suðri og landsynningi og regn. Sunnudagin upp í skrið ella storm av útsynningi og ælingur. Hitin millum 10 og 14 stig.

# Høgni Lisberg á Iceland Airwaves

**Í oktober spælir Høgni Lisberg á víðagitna íslendska tónleikafestivalinum Iceland Airwaves í Reykjavík.**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Tá stóri íslendski tónleikafestivalurin Iceland Airwaves fer av bakkastokki í døgunum 18. til 22. oktober, verður tað aftur í ár við føroyskari luttøku. Høgni Lisberg gjørdist av sær sjálvum høvuðsnavn á føroysku AME hátíðini í Reykjavík í fjør. Løgini Morning Dew og Learn To Ride On Waves, vórðu nógv spæld í íslendskum útvarpi hesa tíðina, og Høgni gjørdi samrøður og spældi beinleiðis bæði í útvarpi og sjónvarpi. Fyri stuttum var Morning Dew við á íslendsku savnsfløguni 100% Sumar, ið er ein væl seld savnsfløga.

- Hesaferð verður tað bara eg við kassagittara, og ikki eins og á AME Reykjavík allur bólkurin, ið skal luttaka, sigur Høgni.

Høgni greiðir frá, at tað var fyri at fylgja AME Reykjavík upp, at hann setti seg í samband við Iceland Airwaves, ið er ein rimmar festivalur, og hann hevur í fleiri mánaðir vita at hann skuldi luttaka.

Í fjør spældi 200 á Iceland Airwaves, og fekk øgiliga góð ummæli.

Fyrr hava bólkar sum Suede, Sigur Rós, Gus Gus, Apparat Organ Quartet og The Flaming Lips, The Hives, Fatboy Slim, Sparta og Thievery Corporation spælt á Airwaves. Festivalurin fær alsamt størri viðurkenning og er vorðin ein sannur sýnisgluggi, har hópin av fólki úr tónleikaídnaðinum luttekur.



*Høgni spældi eina góða og lívliga konsert á AME Reykjavík í Nasa*
*Mynd: Niels Uni Dam*

Konsertirnar verða hildnar í miðbýnum í Reykjavík, eini 4-6 spælistøð eru karmar um størru tiltøkini, meðan smáar barrir og kafe'ir verða karmur um smáu tiltøkini. Av nøvnunum, ið eru almannakunngjørd í ár, eru bretsku Kaiser Chiefs uttan iva høvuðsnavnið.

Høgni Lisberg sigur, at hann vónar at luttøkan á Airwaves fer at hjálpa við økja um fløgusøluna í Íslandi, og um møguleikarnar fyri at koma aftur og spæla.

Høgni hevur júst gjørt sáttmála við nýggjan umboðsmann. Talan er um danan Jesper Kemp, ið m.a. hevði rættiliga nógv at gera við gamla bólkin hjá Høgna, Clickhaze.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -- |
| Nuuk | 4 |
| Qaqortoq | 6 |
| Ammassalik | -- |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 10 |
| Seyðisfjørður | 11 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 19 |
| London | 24 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 11 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 16 |
| Keypmannah. | 15 |
| Helsinki | 16 |
| Moskva | 16 |
| Berlin | 21 |
| Warzawa | 18 |
| Kiev | 17 |
| Bukarest | 23 |
| Paris | 28 |
| Madrid | 32 |
| Róm | 28 |
| Malorca | 28 |
| Athen | 29 |
| Malta | 30 |
| Tunis | 30 |
| Beijing | 25 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 29 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 15 |
| New York | 31 |
| Miami | 24 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | 31 |
| Panama | 15 |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 15 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 984 hPa. í landsynning úr Hvarvinum fer eystureftir og dýpist. Brúgvaløg við Føroyar flyta seg lítið.




**Í dag:**
Lágtrýstið sunnan fyri Ísland stendur mestsum í stað og brúgvalagið haðani verður við Føroyar mikukvøldið. Ódnin "FLORENCE" er við Cape Race og fer spakuliga eystureftir.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 6/9 kl. $06^{00}$– 7/9. $06^{00}$. Hitin í gjár: 9,9°
Minsti hiti máldur í september: 0,2° - Mesti hiti máldur í september: 22,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 6/9 kl. $06^{00}$– 7/9 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í september: 0,0 mm

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI




## VESTFALLSKYRRINDI

7. september Full máni
8. september Mánin næstur jørðini
14. september Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2006

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 12. Sept | 10.53 | 23.20 | 09.53 | 22.20 | 10.08 | 22.35 | 00.27 | 12.53 | 01.27 | 13.53 | 09.08 | 21.35 | 08.08 | 20.35 | 11.08 | 23.35 | - | 12.08 | 10.38 | 23.05 | 11.53 | - |
| 13. Sept | 11.48 | - | 10.48 | 23.29 | 11.03 | 23.44 | 01.20 | 13.48 | 02.20 | 14.48 | 10.03 | 22.44 | 09.03 | 21.44 | - | 12.03 | 00.35 | 13.03 | 11.33 | - | 00.20 | 12.48 |
| 14. Sept | 00.29 | 13.11 | - | 12.11 | - | 12.26 | 02.29 | 15.11 | 03.29 | 16.11 | 11.26 | - | 10.26 | 23.29 | 00.44 | 13.26 | 01.44 | 14.26 | 00.14 | 12.56 | 01.29 | 14.11 |
| 15. Sept | 02.14 | 14.35 | 01.14 | 13.35 | 01.29 | 13.50 | 04.14 | 16.35 | 05.14 | 17.35 | 00.29 | 12.50 | 11.50 | - | 02.29 | 14.50 | 03.29 | 15.50 | 01.59 | 14.20 | 03.14 | 15.35 |
| 16. Sept | 03.01 | 15.28 | 02.01 | 14.28 | 02.16 | 14.43 | 05.01 | 17.28 | 06.01 | 18.28 | 01.16 | 13.43 | 00.16 | 12.43 | 03.16 | 15.43 | 04.16 | 16.43 | 02.46 | 15.13 | 04.01 | 16.28 |

5 707265 100036 >